gult cyan magenta svart



## Viðmerking:

# Bert eitt dylhøvd óttast einki

Viðhvørt verður sagt, at vit hava orsøk til at óttast fyri framtíðini. Hetta er greitt, tí bert eitt dylhøvd óttast einki. Ein og hvør, ið hevur gonguvit, dugir at síggja, at tað kunnu vera vandar fyri framman, sum tað ræður um at skáka sær undan við at nýta vit og skil.

Tað er somuleiðis verulig orsøk til at óttast fyri, hvussu tað fer at gangast landi og fólki okkara. Ikki allir dagar fara at hava við sær stilli og streymloysi, vit mugu bæði rokna við brimi og mysing.

Men tá ræður eisini um at síggja, hvørjir vandar eru veruligir, og hvørjir ikki eru tað. Fylgja vit við í føroysku fjølmiðlunum, so tykist tað, eins og tann stóri vandin fyri framman er at vit gerast eitt fullvalda ríki. Hví so skal vera er eitt sindur ógreitt, tí smá, fullvalda ríki standa seg vanliga væl í altjóða høpi.

Hin vegin er tað nógv sum bendir á, at tann veruligi vandin fyri okkum er tann, at vit ikki gerast eitt fullvalda ríki, men halda fram við at vera saman við Danmark.

Orsøkin til hetta er einføld. Nú hava vit tosað um at gerast eitt sjálvstøðugt ríki síðani Andrass Sámalson sum ungur maður førdi hetta hugskot fram fyri yvir hundrað árum síðani. Í 1946 var hetta eisini samtykt á eini demokratiskari fólkaatkvøðu, sum donsku myndugleikarnir skipaðu fyri. Nú hava vit ein løgtingsmeiriluta, sum hevur skipað eitt landsstýri, sum hevur til endamáls at Føroyar skulu hava suverenitetin. Kemur einki burtur úr hesum, so er fryktandi fyri, at vit í enn størri mun enn nakrantíð koma at gerast ein máttleysur útjaðari av Danmark, sum í sínum lagi er ein máttleysur útjaðari av ES.

Hesum er øll orsøk til at óttast fyri. Vit hava jú kent sviðan av hvussu muran er í donsku politikarunum. Tá væl gongs her, eru teir so fittir, so fittir. Tá tosa teir um, at sambært búskaparpolitikkinum hjá Keynes skal tað almenna játta pening til búskaparliga veikar útjaðarar fyri at fáa teir upp á føtur. Men tað Keynes segði, var at tá tað gongur gott fíggjarliga, tá skal tað almenna tátta í, fyri at vit ikki fáa ovurupphiting av búskapinum. Men tá alt tað føroyska samfelagið í áttatiárunum gjørdist ovurupphitað, tá fylgdu teir donsku politikarnir ikki ráðunum hjá Keynes, men øktu á hvørjum ári peningajáttanirnar til Føroyar og stoyttu soleiðis bensin á inflatiónsbálið. Teir høvdu ivaleysar heimildir til at gera tað rætta, men tað vildu teir ikki.

Hin vegin sigur Keynes, at tá tíðirnar versna, tá skal tað almenna traðka til og játta pengar til tess at samfelagið ikki skal støðga upp. Harvið slepst undan arbeiðsloysi og fráflyting. Men hvat gjørdu følsku vinir okkara tá vit fyrst í nittiárunum komu út í hesa vanlukku av tí at vit fingu nøkur ár uttan rokfiskiskap? Tá kom eingin hjálp frá teim-



undir í skatti og kravdu av okkum at vit skuldu skera niður útreiðslur hins almenna við tí avleiðing, at vit fingu arbeiðsloysi sum ongantíð fyrr. Teir løgdu beinleiðis fótonglar fyri okkum og gjørdu, at vit tá mistu 8000 av brøðrum og systrum okkara, sum síðani hava livað í útlegd sum jødarnir í Babylon.

Henda vanlukka var ikki av tilvild, men var tilætlaður fyri at knúlva okkum niður. Eitt av gomlu orðatøkum okkara sigur: Tá ið vesalamaður fær vald, veit hann sær ikki afturhald. Tað donsku politikararnir vístu mótvegis okkum í hesum árunum var júst tað, at teir vóru vesalamenn. Teir kendu seg at hava valdið á okkum, tá okkum gekst illa, og teir vistu sær einki afturhald í hvussu teir skuldu pína okkum. Teir skipaðu eisini fyri tí gruggi, sum kom undan kavi í Danmark í hesum árum (Spar skat - skyd en færing).

Tað, sum er fryktandi fyri, er hvat ið kann henda okkum, um vit ikki sleppa okkum frá hesum skálkunum. Tað er lætt at ímynda sær, hvat ið politikarar við slíkari muru kunnu finna upp á, um teir fáa enn eitt høvi til at hæla okkum niður.

Hvussu lítið teir brýggja seg um demokratiið vísa teir skilliga í hesum døgum, tá teir lata danska fólkið gera av, hvørt vit skulu gerast ein partur av evruøkinum, og ikki leggja spurningin fyri okkum at taka støðu til. Hvussu kunnu vit líta á, at teir verða petti betri tann dag, ið tað óvæntaða hendir, at tað er meir oljuríkidømi í føroyaøkinum enn í danska økinum? Tá hava teir valdið yvir okkum, og tá kann einki forða teimum í at nýta tað vald teir hava. Teir hava longu sagt, at tað hevði borið við sær, at ríkisveitingarnar verða avtiknar, og teir hava nógvar aðrar streingir á boga sínum til at skjóta okkum við.

Hesum er fryktandi fyri, og tí er øll orsøk til hjá okkum at sleppa okkum á dyr meðan væl er. So eru vit ikki vongskerdir heimafuglar hjá teimum, men eru førir fyri at vera við í altjóða samstarvi á jøvnum føti um slík mál, sum gagna tjóð okkara. Hetta samstarv, sum eisini kann vera við Danmark, er tað einasta sum kann geva okkum veruliga trygd, og sleppur okkum harvið úr tí marru, sum tann núverandi støðan hevur verið fyri okkum.

**Zakarias Wang**

# Manipulerar Landstýrið við skattaprocentum?

Landstýrið segði føroyingum fyri kortum, at skattatrýstið var lægri her enn í Danmark. Nú siga teir at Nyrup lýgur, tá hann sigur tað sama sum teir sjálvir.
Skattir og avgjøld:

Øll vita vit, at núverandi samgonga er sera glað fyri at krevja sum mest inn í skatti frá føroyingum. Teir hava tí heldur onki gjørt fyri at lækka um hendan. Fyri kortum sendi fíggjarmálaráðharrin út skriv, har talva vísti, at skattatrýstið í Føroyum var lægri enn í Danmark. Nú Nyrup sigur tað sama, so ákæra teir hann fyri at siga ósatt. Tað vil siga, at teir nú viðganga, at teir sjálvir hava sagt ósatt fyri føroyingum. Vit fáa nú greitt at vita, at nettoskatturin er hægri í Føroyum enn í Danmark. Men tað man neyvan undra nakran skattgjaldara, at soleiðis er. Tí skatturin er enn alt ov høgur, og má lækkast. Um ein onnur samgonga kemur til, so má tað við í samgonguskjalið - og haldast! Tí núsitandi samgonga hevur svikið í ólukkumát á hesum eins og á øðrum økjum.

Skattir eiga at lækka:

Tíverri tykjist núverandi samgonga vilja krevja sum mest inn í skatti, fyri at royna at gjalda sum minst útaftur. Tað gevur so eitt yvirskot á løgtingsfíggjarlógini, ið teir reypa ófført um.

Tíverri sást frøin ivir fløðandi skattakrónurnar millum annað á fremstu síðu í seinasta Dagblaði. At slík slaktan av skattgjaldaranum kann gleða nakran, er at undrast ivir.

Vónandi kemur Fólkaflokkurin aftur „niður á jørðina“ og gloymir alt um loysing fyri aftur at vera við at royna at lækka um skattirnar hjá føroyinginum. Tað eru vit nógv í ynskja.
Men sera álvarsligt er tað, at Landstýrið hevur sagt ósatt fyri føroyingum um skattin!

**Vinarliga Marjus Dam**



# Summartónar 2000: Í kvøld og í morgin í Norðurlandahúsinum

### Ein deutsches Requiem

**og annar tónleikur eftir Johannes Brahms.**
Í kvøld kl. 19.30 og í morgin kl. 16.00 verður aðalkonsertin hjá Atlantsljómi sum partur av ***Summartónum 2000*** at hoyra í Norðurlandahúsinum.

Luttakandi í ár eru 110-manna felagskór við *Ginnungagap* úr Noregi, *Dania Sonans* úr Danmark og *Havnarkórinum saman við øðnum sangarum* úr Føroyum.

60-manna symfoniorkestrið telur tónleikarar úr *Sandnes Symfoniorkester* í Noregi, *Austrian Art Ensemble* úr Eysturríki, og úr *Føroya Symfoniorkestri*. Solistar eru *Berghild Poulsen* úr Havn og danski sangarin *Lars Thodberg Bertelsen* og listarligi leiðari og dirigentur er ***Yaacov Bergman*** úr USA.

Á skránni er tónleikur eftir Brahms.

### Johannes Brahms

(1833–97)
varð føddur og barnvaksin í Hamborg, men livdi og virkaði mesta av ævi sínari í Wien.

Brahms fekk sín fyrsta týðandi íblástur frá tí um 20 ár eldra samtíðarmanninum Robert Schumann, men leitaði, sum frá leið, meira aftur til klassikarar sum Bach og Beethoven. Í tónleiki hansara finnur tú bæði stranga kontrapunktiska reglusemið hjá barokktónleikinum og ta meira frígjørdu tónaviðgerðina hjá romantikkini. Stóru, dragandi linjurnar og kensluríka innihaldið eyðkenna hendan tónleik og hava ikki bert gjørt navnið Brahms elskað og virt millum leikandi/syngjandi eins væl og lurtandi, men eisini veitt Johannes Brahms sæti millum musikksøgunnar allarfremstu tónaskøld.

Fyri kórsangarar var tað ein eydna, at Brahms sjálvur arbeiddi nógv við kórum og hevur skrivað fjøld av eiggiligum kórtónleiki, sum leitar fram tað einfalt vælljómandi og ofta byggir á fólkatónleik.

Á stóru Brahms-konsertini í Norðurlandahúsinum í kvøld kl. 19.30 og í morgin kl. 16.00 verða trý verk eftir Johs. Brahms at hoyra.

### Akademische Festouverture

er at meta sum programmtónleikur, ein serenda, eitt kvøldarljóð, sum greiðir frá ovfarakátum studentum, sum við miklum rómi eru farnir »í býin«. Ymiskir týskir studentasangir eru at hoyra, har symfoniskt viðgjørdir undir meistarans hond, og sum krúnan á verkinum kemur altjóða akademikarakórið fram um øll »Gaudeamus igitur, juvenes dum sumus«.

Høvi til hesa ouverturu var tað, at Brahms í 1879 var vorðin tilnevndur heiðursdoktari við lærda háskúlan í Breslau. Sum tøkk hevði tá Brahms aftan á stuttleika av at festa á blað hetta tónleikaliga studentakæti og senda universitetinum tað.

**Schicksalslied,** lagnuljóð, er við á skránni sum eitt verk, sum bæði við sínum tónleikaliga dámi og sínari orkesturmanning hóvar væl í framførslu saman við Requiem. Brahms hevur her sett tónleik til eina av yrkingunum hjá gitna týska romantikaranum Friedrich Hölderlin. Hetta er eisini romantiskur tónleikur í orðsins sonnu merking, kór- og orkesturljómur, sum rýnir bæði við tanka og sál.

### Ein deutsches Requiem

At vinmaðurin R. Schumann doyði bert 46 ára gamal í 1856 mundi gera sítt til, at Brahms í 1857 fór undir tað verkið, sum við sínum veldi og tónleikaliga fjølbroytni ikki bert er at meta sum hansara størsta tónleikaliga avrik, men samanumtikið hevur vunnið sær eina serstøðu millum øll tónaverk: *Ein deutsches Requiem.*

Verkið varð tó lagt til viks og ikki fullført so beinanvegin; men tá móðirin bráðliga andaðist í 1865, varð hugskotið um eina deyðsmessu tikið uppaftur. Tað komu tó at ganga enn trý ár, fyrr enn Brahms fekk lagt seinastu hond á.

Í hesum stórverki kemur rættiliga til sjóndar instrumentali kunnleikin hjá symfonikaranum Johs. Brahms og hansara alkøni førleiki at skriva stórbæran polyfonan kórtónleik, sum ikki minst sipar aftur til oriatoriimeistaran G. Fr. Händel. Messan er í sjey pørtum, og hon víkur soleiðis longu í sínum formi frá traditionellu 5-parta katólsku messunum. Eisini í innihaldinum gongur Brahms egnar leiðir.

Teksturin er ikki tann vanligi latínski messuteksturin, men Brahms hevur sjálvur valt tekstin a sínum móðurmál týskum burtur úr Bíbliuni.

Brahms las nógv í Halgubók, men var sjálvur kristiligur á ein meira mannvinarligan hátt heldur enn dogmatiskur og sekteriskt dømandi. Sum hann sjálvur tók til: »Lívið hevur veitt mær størri sársaka, enn eg vænti mær av deyðanum«.

Um enn dómadagsklokkur eisini dynja í hesari deyðsmessu, eru tað tí ikki glatunnar heljarljóð, men heldur boðskapurin um uppreisn og sæla framtíð í tí æviga bústaði, sum eyðkenna hetta megnarverk.

**Ó.H.**

### Heiðursløta um nýggju ólavsøkukantatu

*Í sambandi við konsertina í kvøld verða kosnu vinnararnir av kappingini, sum Kórsamband Føroya læt útskriva um nýggja ólavsøkukantatu, almannakunngjørdir og prísirnir handaðir.*



gult cyan magenta svart

## Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:**
**www.sosialurin.fo**

# HB vil vinna

*Annika Hansen, sum er liðskipari á HB liðnum, væntar ein strævnan dyst sunnudagin*

JÁKUP MØRK

Beint eftir venjing hóskvøldið fingu vit orðið á Anniku Hansen, sum sunnudagin fer á vøllin sum liðskipari á HB liðnum.

### Góðar vónir

Málverjin, sum í fjør varð kosin besti málverji í landinum, sigur seg so avgjørt hava góðar vónir til dystin sunnudagin.

Tað verður so undir ongum umstøðum talan um, at vit fara á vøllin fyri at tapa 8-0, sigur hon, tá vit spyrja hana um vónirnar til sunnudagin. Við hesum sipar hon til landskappingardystin, sum HB spældi í Klaksvík um vikuskiftið, har eitt illa mannað HB fullkomuliga var fyri ongum móti KÍ.

Tvørturímóti sigur hon seg hava góðar vónir um, at tað fer at eydnast HB kvinnunum at vinna steypafinaluna annað árið á rað.

### Broytt lið

Í mun til undanfarnu dystirnar, er HB liðið umskipað nakað til sunnudagin. Úr Danmark er fyrrverandi liðskiparin, Eyðvør úr Dímun, komin at hjálpa, og hetta sigur Annika er ein sjálvsagdur styrkur hjá teimum.

Hinvegin dregur frá, at Liljan av Fløtum Jespersen, Vivian Thorleifsson, Gunn Müller og Birita Nielsen ikki verða við á liðnum. Allar hava tær annars roynst væl í ár, men kunnu av ymsum ávum ikki vera við sunnudagin. Eyðvør Thomsen hevur eisini verið heldur ivasom vegna skaða, men roknað verður við, at hon er før fyri at spæla sunnudagin.

Annika ivast tó ikki í, at tær megna at seta eitt sterkt lið saman, og tað tykist heilt vist, at tær fara eftir sigrinum.

### Viljan sum vápn

Júst hvørjar lutir HB liðið fer at leggja størsta dentin á sunnudagin, visti Annika ikki at siga. – Í kvøld hava vit havt vanliga venjing, og tað verður ikki fyrr enn fríggjakvøldið, at vit fara at gera okkum rættuliga til dystin, segði málverjin, tá vit tosaðu við hana hóskvøldið.

Eitt, sum kanska hevur eyðkent HB liðið undanfarin ár, er tann sterki vinnaraviljin, sum er á liðnum, og Annika roknar so avgjørt við, at brúk verður fyri hesum í morgin. – Viljin er í øllum førum eitt gott vápn at hava við, heldur hon fyri, tá spurt verður um hetta.. Hon leggur afturat, at hóast tær ikki rættuliga eru farnar at tosa um dystin enn, so er heilt greitt, at allar eru sera uppsettar at vinna dystin.

### Hjálp frá áskoðarunum

At enda sigur Annika, at hon vónar, at tær á vøllinum koma at fáa dyggan stuðul frá áskoðarunum.

- Tað vildi so avgjørt verið ein stór hjálp, sum vit als ikki siga nei takk til, sigur Annika, sum vonar at áskokðarnir leggja leiðina framvið ovara vølli, áðrenn farið verður niðan á Tórsvøll..

Hon greiðir frá, at tá finaludysturin í fjør varð leiktur (eisini móti KÍ) byrjaðu áskoðararnir ikki at koma, fyrr enn dysturin var so at siga liðugt leiktur.

- Tað ferðina fingu tey tó nakað við, tí talan gjørdist um longda leiktíð. Í ár vóni eg tó ikki, at støðan verður tann sama. Tá vil eg heldur, at dysturin er avgjørdur til okkara fyrimun áðrenn tað er komið so langt, sigur HB liðskiparin at enda.



*Ársins málverji í fjør, Annika Hansen, væntar, at stríðsviljin verður eitt gott vápn at hava í hondini sunnudagin*

**Lesið Sosialin - Vit eru, har tað hendir**

# Nú skal tað verða hjá KÍ

*Malena Jospehsen heldur, at KÍ í ár hevur allar fortreytir fyri at vinna finaludystin*

JÁKUP MØRK

- Vónirnar hava ongantíð verið betri, sigur liðskiparin á KÍ liðnum, Malena Joephsen, sum í morgin skal heilsa upp á dómarabólkin, áðrenn steypafinalan hjá kvinnunum verður blást í gongd.



*KÍ liðskiparin, Malena Josphseen, roknar við, at talan verður um ein truplan dyst, men at KÍ kortini fer at vinna steypafinaluna*

### Verður ikki lætt

KÍ liðskiparin ger tó í sama andadrátti púra greitt, at hon ikki á nakran hátt roknar við einum løttum dysti, men kortini roknar hon við sigri.

- Sum vit hava spælt higartil í ár, so eiga vit at vinna dystin, heldur hon fyri. Spælið hevur gingið sera væl í flestu dystum, og enn hava vit ikki roynt at tapt, hóast vit hava havt dystir móti bæði B36 og HB, heldur Malena.

Tríggjar ferð áður hevur hon verið við í slíkum finaludysti, men hvørja ferð hava tað verið tær á mótstøðuliðnum, sum hava tikið steypin.

- Møguleikar okkara eru helst betri í ár enn teir nakrantíð hava verið, so hesu ferð skulu vit vinna, heldur liðskiparin.

Hóast sera spent, so heldur hon kortini ikki, at tað kann nerva KÍ liðið, at tær soleiðis hava tapt finaludystin hvørja ferð, tær hava verið annar parturin.

### Møguleikarnir skulu nokk koma

Spurd um, hvat hon heldur verður avgerandi fyri dystin, svarar Malena, at tað sum so ikki er nakar ávísur lutur.

- Tað týdningarmesta er tó, at vit standa okkum sum eitt lið. Serliga skulu vit hava fatur á teimum a miðvøllinum og í verjupartinum. Megna vit hetta, fara møguleikar uttan iva at stinga seg upp har frammi, og so verður tað upp til okkum í álopinum at gera nýtslu av hesum.

Malena er væl vitandi um, at nakrir av leikarunum hjá HB ikki eru tøkar til finaludystin, og hon heldur, at hetta sjálvsagt kann gera liðið nakað veikari. Hon leggur tó dent á, at tær við Eyðvør hava fingið ein leikara, sum so avgjørt styrkir um liðið, líkamikið um hon verður nýtt í álopinum ella, sum væntað, á miðvøllinum.

Tær hjá KÍ hava allar sínar leikarar tøkar, og Malenda sigur, at tær allar eru sera uppsettar til dystin. Harumframt kemur jú eisini Hillerød leikarin, Lisbeth Hansen at styrkja um hjá teimum. Hon kom tó ikki til landið fyrr enn í gjárkvøldið, so Malena visti sum so einki nýtt at siga frá í hesum sambandi.

### Upphiting hjá Býráðnum

Tá vit í gjár prátaðu við Malenu, vóru tær so smátt farnar at fyrireika seg til finaludystin. Ein partur av hesum fyrireikingum var, at tær skuldu á vitjan í Býráðssalinum.

Júst hvørji ørindini vóru her, visti hon ikki, men hon roknaði við, at hetta varð gjørt, fyri líka sum at seta tær eyka upp. Kanska við at fáa at vita, hvønn týdning ítrótturin hevur fyri Klaksvíkina og soleiðis.

At enda sigur Malena, at hon vónar, at talan verður um ein góðan og undirhaldandi dyst. – Vit ætla í øllum førum at gera okkara fyri, at so verður, eru seinastu orð hennara.